## VIÐMERKINGAR

# Degns hús – avpressing og fíggjarligt svans!

**Bjørn á Heygum**



Fólk eru vorðin rættuliga skelkað av hesum seinastu tíðindunum, har almennur peningur verður nýttur til at okra teir frammanundan ógvusligu sethúsaprísrinar í høvuðsstaðnum enn eitt risalop til himmals.

Ovfarin eru vit vitni til, at eini simpul lítil eitthundrað ára gomul hús í miðbýnum nú eru seld til Tórshavnar Kommunu fyri ein fullkomuliga høpisleysan prís uppá heilar 5 mio kr.

Talan er um Degn´s Hús, sum Tórshavnar Býráð eftir øllum at døma hevur sett sær fyri at keypa fyri nærum ein og hvønn prís. Tað letur til at húsini bara skulu yvirtakast - kosta tað sum tað kosta vil!

Men hvør er søgan og hvør er bakgrundin fyri hesum ódámliga handli og fyri tann sak skyld - fyrilitarleysa oyðsli við almennum peningi.

Jú, søgan byrjar vælsaktans við, at hesin nýggi eigarin keypir Degn's Hús fyri 1,8 mio kr. fyri nøkrum fáum árum síðani.

Hann hyggur sjálvsagt eftir byggisamtyktini fyri miðbýarøkið og sær, at møguleiki er fyri at útbyggja og vaksa um virði á ognini. Hann kann ríva verandi heldur skirvisliga bygning niður og byggja ein størri handils- og skrivstovubygning á somu grund.

Sum sagt so gjørt! Hann søkir Tórshavnar Kommunu um byggiloyvi innan fyri teir karmar, sum ásettir eru fyri bygging í økinum og sum er vælsignað av hesi somu kommunu. Hann hevur sostatt krav uppá at fáa byggiloyvi.

Men gakk! Nú kemur røringur í. Nakrir borgarar vilja halda at hesi hús eru søgulig og varðveitingarverdug. Tað sigst, at talan er um eitt serstakt umhvørvi, sum ikki má skemmast av nýggjari bygging, Tey vilja vera við, at ein mentunarligur dýrgripur er um at fara fyri skeyti, so nú eru einastu ráðini at friða húsini sum fornminni, Farið verður í holt við eina undirskriftsinnsavning og undirtøkan er ófør. Fleiri túsund undirskriftir vóru handaðar Tórshavnar Kommunu við áheitan um at friða husini, so eigarin ikki kundi fara í holt við ætlaðu nybyggingina.

Her vóru nógvar atkvøður, so nú mátti byggisamtykt vera byggisamtykt. Tað er jú ikki byggisamtyktin, sum avgerð um býráðslimirnir vera afturvaldir!

Málið um byggiumsóknina frá eigarunum varð av somu orsøk súltað. Tað ráddi um at vinna tíð hjá kommununi. Friðingartiltøk vóru sett í verk, men tíverri fyri býráðsmeirilutan, so strandaði henda ætlan hjá landsstýrismanninum, sum ikki tók undir við friðingini.

Eigarin kravdi nú aftur at fáa byggiloyvi, sum hann samb. lógini og egnum samtykt býráðsins hevði krav uppá.

Nú vóru góð ráð dýr. Antin breyt Býráðið egnu byggisamtykt sína og sýtti fyri byggiloyvi ella gav byggiloyvi og fekk allir hesar mongu borgarar uppá nakkan, sum høvdu ynskt at varðveita Degn's Hús.

Ein triði útvegur kundi væl finnast. Vell - eitt gløgt høvd fann so uppá tað skilagóðu loysn bara at keypa húsini, so bleiv friður og sami vandi stóðst nokk ikki av at missa høvdi, sum býráðspolitikari av hesi loysn í mun til sera ópopuleru loysnina at fylgja byggisamtyktini!

Sum sagt so gjørt. Samráðingar vóru tiknar upp við eigaran um keyp av húsunum. Eigarin var ikki føddur í gjár, og sær beinanvegin møguleikan fyri at leggja trýst á Býráðið, sum var komið í klemmu millum hann og ein stóran skara av borgarum í Havn - og ikki at forgloyma atkvøður til næsta val!

Hann legði hart út. Nú skuldi Býráðið bløða fyri ikki at virða sína egnu byggisamtykt. Ein prísur var lagdur á, sum var púra óhoyrdur, og sum ongin á privata marknaðinum bara vildi droymt um at givið fyri eina gamla "smáttu" um hon so enntá lá í miðbýnum í Havn.

Men eigarin visti at hann hevði góð kort uppá hondina og, at Býráðið nokk lat seg kroysta. Og so var! Býráðið bognaði og lat hægsta prís sum nakrantíð er givin pr. m 2 fyri eini sethús - og henda rekord verður neyvan sligin í bræði, um enn nakrantíð!

Men er hetta ikki ein ótrúliga vandamikil leið at ganga? Skal tað almenna ganga á odda við at okra sethúsaprísirnar upp? Verður hetta ikki eitt fordømi og leggur støðið í framtíðini? Er kommunan nú vorðin friðingarmyndugleiki kundi ein spurt og er tað í heila tikið ein kommunal uppgáva at seta friðingartiltøk í verk við at lata seg kroysta at keypa ognir fyri okursprísir? Skulu ikki reel virðir liggja aftanfyri nýtslu av peningi skattgjaldarans? Skal íløgan ikki umboða eitt tilsvarandi virði og ikki sonevnd friðingarmotivir? Kann ein kommuna verða offur fyri regulerari pressión ? Eri vit ikki á kantinum av kommunulógini hvat viðvíkir spurninginum um at umsita almennan pening á lógligan og skynsaman hátt ?

Tað má sostatt staðfestast, at tað er ivasamt um tað fyriliggur ein sokallað lóglig og saklig grund fyri at ognast viðkomandi hús yvirhøvur. Tað er heldur ikki sørt, at mangt og hvat kundi tala fyri, at kommunali eftirlitsmyndugleikin fór at kanna málið nærri.

Eisini er tað viðkomandu at spyrja um ein byggisamtykt ikki skal virðast, tá henda má ætlast at vera ein almenn fráboðan um, at ávís bygging ótarnað kann fara fram innan fyri ásettar karnar, uttan at henda samtykt verður vend á høvdið og nýtt sum jarnbrot hjá einstaklingum at kroysta sama bygimyndugleika til at fráfalla egin mál og mið fyri bygging í avvarðandi øki.

Ein kann meina hvat man vil um hetta góða hús.Eitt er tó vist, at gamla upprunaliga umhvørvið er longi oyðilagt og bøtist ikki aftur óheft av um Degn´s Hús standa har ella ikki Um húsini eru so varðveitingarverdug kundi tað eisini verið ein loysn at flutt tey í heilum líki til annað stað í býnum, har tey betur komu til sín rætt enn millum høgar betongbygningar í miðbýnum. Her hevði tað so ikki verið neyðugt at taka skattaborgaran sum gísla fyri populistiskar avgerðir og løtuvinning hjá ávísum politikarum í Tórshavnar Býráð

Enn einaferð mugu vit so sanna gamla orðafelli um, at lætt er at brúka pening, serstakliga annans mans pening!

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Jólakalendarin hjá Jan



**Sum fyrrverandi borgarstjóri mátti Jan Christiansen verið tann fyrsti at vitað, at skattalætti ikki er nakað, ein kommuna kann loyva sær at lata, uttan at gera sær greitt, hvar peningurin tá skal finnast. Men tað er sjálvandi lætt at spæla miskunnsamur samariubúgvi, tá tú situr í andstøðu**

**Heðin Mortensen**
*borgarstjóri í Tórshavnar kommunu*

Jan Christiansen, fyrrverandi borgarstjóri í Havn, hevur nú latið upp aðru lúkuna í sínum nýggja jólakalendara, og innanfyri lá enn eina ferð ein kommunalur skattalætti, ið bert hevur tann trupulleika, at hann ikki kann lata seg gera, uttan at støða verður tikin til, hvørjar tænastur tá skulu veljast frá.

Fyri enn eina ferð at skera tað út í papp, so Jan kanska skilir tað, so er prinsippið í innkrevjing av kommunalum skatti tað, at ein kommuna bert hevur loyvi at krevja inn tann pening, hon hevur brúk fyri.

Kommunulógin er greið, tá talan er um skattaprosentið, tí hetta prosent má hvørki vera størri ella minni enn tað, sum umsitingin av kommununi kostar komandi árið. Tí er tað beinleiðis lættisoppur at koma við uppskoti um kommunalum skattalætta, uttan at vísa á, hvar peningurin tá skal finnast!

Jan Christiansen mátti av øllum vitað, at røkkur ætlaða skattaprosentið ikki til komandi ár, má annaðhvørt fíggjarætlanin lækkast ella skattaprosentið hækkast.

**Klokkuklár semja**

At skattaprosentið í Tórshavnar kommunu fyri 2006 verður hækkað, hevur beinleiðis samband við ta samtykt um at lækka landsskattin, sum løgtingið gjørdi í vikuni. Hetta er liður í einari semju um fíggjartørvin hjá kommununum, ið landsstýrismaðurin fíggjarmálum øðrumegin fyri einum mánaði síðani gjørdi við Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag hinumegin.

Í løgtingsuppskotinum verður gjørt púra klárt, fyri ikki at siga klokkuklárt, at henda skattalækking skal skapa møguleika fyri, at kommunurnar kunnu hækka sínar inntøkur til at fíggja tey øki, ið verða løgd út til kommunurnar at umsita, harav serliga barnaverndin kostar nógv.

Tað er altíð lætt at spæla miskunnsamur samariubúgvi og at reka popputan andstøðupolitikk við at lova í eyst og vest, men vit, ið manna meirilutan í Tórshavnar býráð, kenna okkara skyldur mótvegis borgarunum og skattapeninginum hjá kommununi, og tí verður kommunan rikin ábyrgdarfult og við tí fyri eyga at tæna borgarunum fyrst og fremst.

**Valda og gjalda**

Nú kommunurnar yvirtaka øki frá landinum at umsita, er sjálvandi tann reglan galdandi, at »skalt tú valda, skalt tú eisini gjalda«. Tí fara vit ikki at spæla hasard við skattaborgarans pengingi, men syrgja fyri at samsvar er millum innkravdan skatt og tað, brúk er fyri.

Tá tað er sagt, so skal Jan Christiansen fáa rætt í, at Tórshavnar kommuna er sera væl fyri fíggjarliga. Men fyri tað, so ætla vit ikki at sita hendur í favn og steðga menningini í kommununi við at lata ein skattalætta, bara tí at landsmyndugleikarnir hava lovað hetta, við teirri avleiðing, at tænastustøðið í kommununi lækkar. At blanda kommunalan skattalætta og broytingar í ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur ber hinvegin ikki til, tí talan er um tvey av hvørjum øðrum óheft viðurskifti.

Vit reka ikki Tórshavnar kommunu eftir nøkrum jólakalendaraprinsippi, men við skynsamari fíggjarstýring, ið fyrst og fremst hevur til endamáls at røkja og betra tær tænastur, kommunan eigur at veita borgarunum!